


# Bjørn Finnsson: Systkinabarn oddamann í Eimskip

**Í seinasta parti vórðu umrødd Johanne, sum var úr Havn, og Bjørn Finnsson, sum var úr Íslandi. Hesa ferð verður greitt frá teirra børnum**

Óli Jacobsen

Bjørn og Johanne fingu trý børn: Christiane Frida (1899), Christian Finnur (1900-1940) og Cristiane Helene Sofie (1906-1980).

Christiane Frida var fødd 11. august 1899 og livdi bert 4 dagar. Hon var uppkallað eftir ommuni í Havn, Christiane Jens Christiansdatter.

## Christian Finnur Finnsson (1900-1940)

Christian Finnur var uppkallaður eftir langabbanum í móðurætt í Havn, Jens Christiani Halfdansen, og abbanum í faðirætt í Íslandi, Finni Jónsyni.

Finnur, sum hann vanliga var kallaður, vaks upp í Bringsnagøtu. Hann spældi í Havnará og í ósanum, sum børnini gjørdi tá. Eisini var tá vanligt, at børnini spældu á steinunum, sum í dag standa ímillum Hotel Hafnia og Dómkirkjuna. Hesir steinar síggjast enn í dag omanfyri Hotel Hafnia.

Tíðum var Finnur eisini á floti við mammubeiggjanum Jens Christian Cornelius Guttesen, vanliga nevndur Stubba-Jens ella Gutta-Jens.

Finnur fór ungur at sigla við sluppini »Lizzie«, sum Klæmint á Syðradali átti. Klæmint stóð eisini faddur hjá soni Finns, Bjørn J. Finnsson, í 1928.

Tá fólkateljingarnar vóru í 1916 og 1921 er vinnuvegur Finns uppgivin sum »fisker«. Hann búði tá heima hjá foreldrunum í Bringsnagøtu.

Í 1927 tók Finnur skiparaprógv hjá Jens Paula í Dali í Havn. Síðani sigldi hann m.a. sum skipari við sluppini »Andreu« hjá Johannes Árting. Eisini var hann tíðum loðsur á skipum, sum komu á Havnina og skuldu víðari til Klaksvíkar ella á Fuglafjørð.

Tíðliga í 1920 árunum møtti Finnur gentu úr Lamba, Elisabeth Marie Johannesen (1897-1975), sum tá tænti hjá Anton Degn í Havn. Tey vórðu trúlovað og giftust í 1924. Tey bygdi sær hús í Lítlu Tvørgøtu.



*Finnur og konan, Elisabeth Maria f. Johannesen úr Lamba, við børnunum Signhild og Bjørn. Myndin er tikin í 1928. Yngsti sonurin, Óli, er ikki føddur, tá myndin var tikin*



*Pétur A. Ólafsson í 1928*





*Christiane og Niels á silvurbrúðleypsdegi teirra í 1958*

## Systkinabarnið stýrisformaður á Eimskip

Eina ferð í seinnu helvt av 1920 árunum lá skipið, Finnur var við, inni í Reykjavík. Christian Lamhauge úr Lamba, vanliga nevndur Christian bóndi, var eisini við hendan túrin. Ein dagin fóru Finnur og Christian í land, at vitja familjuna hjá Finni. Christian tosaði ofta seinni um, hvussu fín hendan familjan og húsini, tey búðu í, vóru: »Vit sukku niður í plússið, tá vit komu inn«, skal Christian hava tikið til.

Helst hevur hendan vitjanin verið hjá Pétur A. Ólafsson (1870-1949), sum var systkinabarn hjá Bjørn Finnsson, pápa Finn, og búði í Reykjavík. Pétur var keypmaður og reiðari og hevði fleiri álitisstørv, m.a. sum stýrisformaður í Eimskip. Eisini var hann norskur og brasilianskur konsul.

Pétur ferðaðist nógv í sínum arbeiði og ofta ímillum Reykjavík og Keypmannahavn. Tá rutubáturin legði inn í Havnini á leiðini, vitjaði hann altíð systkinabarnið Bjørn, Johannu og børnini.



*Finnur og Elisabeth Maria fingu trý børn: F. v. Signhild (1926-1989), Bjørn (f. 1928) og Óli (f. 1930)*

## Skipakeyp og tíðin í Lamba

Í 1929 keypti Finnur sluppina »Vælfarið« og doypti hana »Capella«. Tíðirnar í 1930 árunum vóru tó ringar til skiparakstur og varð sluppin seld fá ár seinni. Húsini í Lítlu Tvørgøtu vóru seld og familjan flutti til Lambar í 1932, har tey bygdu sær onnur hús.

Í Lamba hevði Finnur deksbátin »Heklu«, sum hann brúkti til útróður og til at sigla við hvalatvøsti ímillum oyggjarnar. Christian Eli Lamhauge í Lamba, sonur Christian bónda, var motorpassari á »Heklu«. Hon varð seinni seld til Skopunar.

Ein part av 1930 árunum sigldi Finnur eisini úti í evropafart við reiðarínum Lauritsen.

Seinri í 1930 árunum bleiv Finnur sjúkur av tuberklum. Hann lá fleiri ferð á sanatoriinum í Hoydølum og andaðist av sjúkuni 15. september í 1940. Hann er jarðaður í eldra partinum av kirkjugarðinum á Glyvrum.

## Cristiane Helene Sofie Holmer (1906-1980)

Christiane var uppkallað eftir ommu síni í Havn, Christiane Jens Christiansdatter (1826-1896). Hon var doypt í Havnar kirkju. Millum faddrarnar var Zacharias Heinesen, pápi Williami.

Christiane fór til Danmarkar at tæna í 1920 árunum og varð trúlovað har. Hetta bleiv tó til einkis, tá mamman, Johanne, bleiv sjúk umleið 1930. Christiane fór heim til Føroyar at passa hana. Hon og mamman vóru ógvuliga nær knýttar.

Tann dagin Johanne doyði í 1931, gjørdi hon av frá sjúkraseingini, hvør skuldi hava hvat av hennara ognarlutum. Hon bað Christiane syrgja fyri, at øll tey ymisku í grannalagnum fingu sítt, eftir hon var deyð. Dagin eftir mátti Christiane so runt í grannalagnum við arvinum eftir mammuna.

Tá foreldrini bæði vóru deyð fyrst í 1930 árunum fór Christiane aftur til Danmarkar. Hon fortaldi seinni, at William Heinesen hjálpti henni at fáa húspláss og sendi flytigóðs hennara til Danmarkar.

Tað skuldu ganga meir enn 20 ár frá tí, Christiane hesa ferð flutti til Danmarkar, til hon kom aftur til Føroyar at vitja. Lítið var ferðast tá, og kríggið sleit øll bond ímillum Føroyar og Danmark í árunum 1939-1945.

Ikki fyrr enn eftir kríggið fekk Christiane deyðsboðini av beiggja sínum, Finni, sum doyði í 1940. Boðini komu ógvuliga óvart og vóru tí ein stórur skelkur fyri Christiane. Sambært Connie Søager, dóttir Christiane, visti mamman ikki, at Finnur var sjúkur.

Christiane giftist við Niels Holmer í 1933. Tey búsettust í Kgs. Lyngby og fingu børnini: Bjørn (1933-1982), Sigvard (1937-2007) og Connie (f. 1946). Niels doyði í 1974.

Niels Holmer var hálvur svii og hálvur sveitsari. Hann var arbeiðsmaður og arbeiddi seinnu mongu árini sum ketilpassari. Christiane var um familjuna í íbúðini í Lyngby og gjørdi annars fyrifallandi arbeiði, m.a. við servering og vasking.

Seinnu árini var Christiane í Føroyum fleiri ferðir. Hon vitjaði í Havn, hjá vinkonuni Karlu hjá Vægtaranum, og í Lamba, hjá svigarinnuni Elisabeth Mariu og børnum hennara.

Tá Christiane var í Havn var hon altíð í Bringsnagøtu og hugdi eftir barndómsheiminum, sum var selt, tá hon flutti til Danmarkar. Mynd er av henni á eldri árum, standandi á trappuni uttanfyri barndómsheimið.

Gott samband var ímillum Christiane og familjuna í Føroyum. Bróðurdótturin, Signhild, sendi henni í nógv ár til jóla um pakka við føroyskum mati.

Meir enn so kom eisini fyri, at hon fekk vitjan úr Føroyum, vinkonum í Havn og børnunum hjá Finni, Signhild, Bjørn og Óla.

## Børnini hjá Christiane og Niels:

Elsti sonurin Bjørn var tónleikari og hevði seinni egið vertshús.

Sigvard var pressufotografur og arbeiddi nógv ár hjá AP-tíðindastovuni og hjá Aller-press.

Connie býr í Greve, saman við manninum Henrik. Tey eru bæði pensjóneraði bankafólk og vóru seinast í Føroyum og vitjaði í 2009.

*Kelda: Bergmann Finnsson*

**Komandi partur** verður um Ingu og Johannes Johannesen, skipara, úr Leynum. Hetta er eisini ein partur av Holm-søguni í Leynum